


vakur. Ongin sær út til at hava tað hart, og tað er hugtakandi at síggja, hvussu mongu leikararnir megna at lata vera við at traðka á hvønn annan og stoyta saman á tronga pallinum.

Í pallmyndunum, tá ungfólkini eru skeiv, vísir tað seg eisini at fungera heilt væl við ljósinum. Vit fáa eina sýrukenda, kokainsøta kenslu, ið er ein uppliving, sum í sær sjálvum næstan ger leikin verdan at fara til.

## Gjøgnumførdir búnar

Í samband við útsjóndina hjá leikarunum er tað eitt, ið veruliga er gjøgnumført.

Orkan, ið er løgd í búnarnar hjá øllum á pallinum er sera væl nýtt. Hevði dreingjahárið bara veri longri, hevði verið torført at seta fingurin á nakað, tí búnarnir og serliga nakrir kjólar, rigga serstakliga væl til sangleikin, og skapa meira trúvirði enn nakað annað í leikinum.

## Lítið provokerandi

Kanska er tað leikritið, ið er ov gamalt, ella er bara ikki fingið nóg mikið burturúr tí, tí tað er í øllum førum greitt, at leikurin er sera lítið provokerandi. Ein sena er tó, ið kanska fær ringastu kyns-skammararnar at lata eyguni eitt sindur upp, men tað er so øgiliga lítið fyri ein leik, ið er brandaður í næstan eitt hálvt ár, til at vera provokerandi og spennandi. Tískil er tað eitt satt vónbrot, at ikki ein einasta løta provokeraði hendan annars rímiliga konservativa ummælaran.



*Leikararnir í Hair eru nógvir í tali, og tiknir úr nógvum støðum. Tí hevði mann helst vænta meira frá teimum*

## Vána áskoðarar

Vit, ið sótu í fjøldini mugu helst eisini taka okkara ábyrgd fyri eina lunkaða uppliving. Ella var leikurin bara ikki so góður. Men áskoðarafjøldin til eina frumsýning er sjáldan líka góð, sum ein vanligur barnagarðsflokkur. Eftir leikin eru vit altíð skjót at greiða frá, hvussu fantastiskir og fríir hesir ungdómar eru, men undir framførsluni sita tey flestu av okkum og klappa av berum vana. Ongantíð er nakar, ið veruliga verður rivin við leikinum, og á nakran hátt kann ímynda sær at klappa mitt í einum sangi, tí hann kanska svingar rímiliga væl.

Nei, vit skulu lata blómur til tey, ið standa aftanfyri leikin, um vit altso hava nóg mikið av tyssum. Teimum vóru tað fríggjakvøldið ikki eingongd nokk av, og ljóssnigevin mátti so fittur fara av pallinum uttan blómur, hóast hann hevur loyst sína uppgávu frægari enn tey flestu.

## Ikki sum hinir

Tá mann hevur sæð Jósef og Fame, verður hesin leikurin ikki heilt tað sama. Ein orsøk kann vera, at sangirnir ikki eru líka fangandi, sum í undanfarnu leikunum. Kanska er uppruna handritið bara verri enn hini. Tað er ilt at siga, men tað hevði nú verið stuttligt at vita, um ikki Cats, Phantom of the Opera ella bara Chess ikki hevði verið ein meiri undirhaldandi sangleikur at fari til. Kanska kundi mann veruliga sæð ungdómarnar víst sínar bestu síður.

## Farið bara

Alt í alt, kann mann siga, at leikurin helst er verdur at fara til. Tað er bara annað hvørt ár, at ein tílíkur leikur verður settur upp. Hesin er ikki líka góður sum hinir, og um tvey ár velja tey helst eisini ein betri leik við betri sangum.

Stóri trupulleikin hjá Hair er, at tað í ov langa tíð og ov nógv gjørt burturúr, hvussu fantastiskur sangleikurin skuldi vera. Tí situr hesin ummælarin við einum vónbroti, sum helst lukkuliga verður gloymt um tvey ár, tá studentaskúlin í Hoydølum aftur fer at nýta næmingar úr miðnámsskúlunum, ókend andlit og ein betri sangleik.